VIÐMERKINGAR

# Einskiljingar við skili

**Høgni Hoydal**



Tað er at fegnast um, um gongd veruliga kemur á einskiljingar av almennu vinnufyritøkunum, har tað almenna eigur sera stór virðir, og har eitt nýtt slag av vinnulívi kann spretta í Føroyum.

Forðingarnar fyri einskiljingum hava higartil í høvuðsheitum verið tvær:

1. At ongin – ja, yvirhøvur ongin – fyrireiking og ætlan er gjørd hjá teimum landsstýrismonnum, ið vara av almennu vinnufyritøkunum. Tilvildarligar útmeldingar um at selja - enntá við politiskari uppíblanding – hava gjørt ilt verri. Ongin ætlan hevur verið fyri, hvussu einskiljingar skulu leggjast til rættis við atliti til ein dynamiskan vinnubygnað og við atliti til samfelagslig og vinnupolitisk mál.

2. At tað ikki hevur eydnast at fáa semju um skipaðar karmar fyri, hvussu pengar og virðir, sum tað almenna fær við einskiljingum, skulu umsitast og nýtast.

**Greið ætlan og Búskapargrunnur**

Tjóðveldisflokkurin hevur langt síðani lagt eina greiða ætlan fyri einskiljingar av almennu vinnufyritøkunum:

Endamálið er:

– Vit skulu hava greiðar linjur millum alment og privat virksemi. Har tað almenna ikki rekur vinnuvirksemi, men har vit ístaðin umvegis skattir og avgjøld tryggja avkast til tað almenna og at felags kassin fær vinning burturúr virkseminum.

– Peningur fyri einskiljingar skulu í Búskapargrunn Føroya og nýtast til at gjalda niður skuld og til veruligar íløgur og framtøk í gransking og menning.

– Einskiljingar skulu gerast við skili og eftir skipaðum kørmum. – Tí hava vit staðið fast við, at seljast skal á einum virðisbrævamarknaði ella eftir somu treytum, sum á einum virðisbrævamarknaði, har krøvini til gjøgnumskygni og fyrireikingar eru greið og gjøgnumskygd.

Hesir karmar skuldu eftirhondini verið komnir uppá pláss við Virðisbrævamarknaði Føroya og við krøvum um útbjóðing og gjøgnumskygni. Men enn restar Búskapargrunnurin, sum semja ikki fekst um í undanfarnu samgongu.

Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt eitt uppskot til Búskapargrunn Føroya, sum verður lagt fram á ólavsøku, og vónandi fæst breið undirtøka fyri grunnin-um.

**Einskiljingar sum nýggjur blokkstuðul**

Men tað ljóðar ófrættakent, sum frættist millum samgongufólk í dag. Sum Torbjørn Jacobsen vísti á í grein herfyri, so tykist ætlanin nú vera at selja skjótast gjørligt til tess at rinda undirskotið á fíggjarlógini. Løgið, at ikki fleiri hava fylgt ávaringini hjá Torbjørni Jacobsen upp og kannað málið.

Er tað rætt, so verður talan um einskiljingar uttan skil. Har hvørki ætlanir eru lagdar fyri, hvussu vinnubygnaðurin í Føroyum kann laga seg. Eiheldur fyri, hvussu avkastið skal nýtast so tað kemur samfelagnum og komandi ættarliðum til gagns.

Verður ikki hugsað um, hvussu eitt nú telemarknaðurin í Føroyum kann menna seg, tá Føroya Tele verður einskilt, so er lítið vunnið. Verður ikki hugsað um, hvussu ferðafólka- og flutningsvinnan og okkara ferðasamband út í heim framhaldandi kann mennast, tá Atlantsflog skal einskiljast, so verður ringt at taka støðu.

Og fer peningur frá einskiljingum ikki til heilt greið og avtalað endamál, sum kunnu styrkja og konsolidera almenna búskapin – heldur enn at gerast ein nýggjur og stokkutur blokkstuðul – so er onki skil í yvirhøvur.

So lat okkum einskilja við skili – og lat okkum fáa eina greiða ætlan frá landsstýrinum, so vit ikki aftur lata einstakar landsstýrismenn spæla hazard við hesum týdningarmikla máli.

# Ikki sparingar, men skilagóðan bygnað

**Kári P. Højgaard**



Hesi »vísdómsorðini« eigur stjórin á Toll og Skattstovu Føroya Óli Heinesen í Dimmalætting 13. juli, í samband við ætlaðu bygnaðarbroytingarnar, har tey seks økini verða minkað niður í tríggjar økisskrivstovur. Eg komið her at nema við norðurøkið Eysturoy og Norðoyggjar.

Slagorðið hevur verið, at uppgávurnar verða best loystar úti í økjunum og tænastunar skulu liggja í nærumhvørvinum so nær borgaranum sum gjørligt.

At tað almenna keypir ein bygning í Klaksvík og brúkar omanfyri 11 milliónir fyri at betra um umstøðurnar hjá Toll og Skatt í Norðoyggjum, fyri síðan at flyta alt virksemi yvir í Eysturoynna, er eftir míni fatan meiri skilaloysi enn skilagott. Føroya nærststørsti býur hevur nógv og økjandi virksemi, samstundis hevur Klaksvík fast farmasamband við útheimin. Tá nýggi bygnaðurin er settur í verk, skulu allir norðingar, sum hava brúk fyri at fara á stovnin við tollingaráheitan ella at avgreiða síni viðurskifti, umframt stríðið eisini gjalda bummgjald.

**Er hetta ikki eitt afturstig ?**

Toll og Skatt í Saltangará man hava tað størsta virksemi av deildunum uttanfyri Havnina. Høvuðsposthúsið í Eysturoy liggur her, og tað varð roknað sum eitt afturstig tá Toll og Skatt, ið húsaðist undir sama taki, flutti úr bygninginum í høli hjá Sparikassanum nakrar 100 metrar burtur.

Nú verður virksemi flutt 12 kilometrar burtur úr tættbygdum øki.

Nógvur inn og útflutningur fer fram um Runavíkar Havn, og høvuðsvirksemi í oynni er her, har tollararnir eisini halda til.

Ein triðingur av teininum í hesum valskeiði hjá samgonguni er rógvin, so nú má ein byrjan hómast á ætlaðu kósini framyvir, men hvat er hent ?

Trupult er at skilja politisku ætlaninar um at flyta skúlar við lóg móti viljanum hjá lokala myndugleikanum og byggja ellis og røktarheim í staðin.

Ein má hava servitan fyri at skilja ætlaðu flytingarnar og bygnaðarbroytingarnar á Toll og Skatt.

Hóast 100 tals milliónir koma at mangla í landskassanum verður tvíhildið um skattalætta til okkum vælbjargaðu áljóðandi 60 milliónir árliga; ein kundi hildið áfram.

Haldi at sambandsflokkurin og samgongan hava skyldu til at greiða føroya fólki frá eini so ógvusligari bygnaðarbroyting, sum nú verður framd á Toll og Skatt.

Ongin av tingmonnum sambandsfloksins ella samgongutinglimum, eg havi spurt, sigur seg hava vita um, ella verið kunnaðir um ætlanina hjá Bárði Nielsen, áðrenn hon alment kom fram

Her er talan um niðurlegging av tveimum teimum størstu økisdeildunum, har møguliga eini 50 fólk starvast. Hvat siga samgongulimirnir Alfred Olsen og co, sum í nevndaráliti vístu á, at tey smáu posthúsini, ið bert høvdu opið fáar tímar um vikuna og sum postverksleiðslan ætlaði at steingja, framhaldandi skuldu verða opin og veita borgarunum hesa tænastuna ?

**Tænastan betrast**

Á heimasíðuni hjá Toll og Skatt verður sagt, at samstarvi millum økisskrivstovurnar og leiðsluna í stýrinum skal mennast, og stovnurin skal veita borgarum og virkjum eina betri tænastu.

Mín metan er, at ætlaðu broytingarnar verða fyri Eysturoyarøki eitt afturstig, og fyri norðingar ein katastrofa.

### 70 ára føðingardagur

Sunnudagin 17. juli fyllur Leo Joensen, Oyndarfjørður, 70 ár. Hann er burturstaddur.

Týsdagin 19. juli verður Daniella Olsen, Hósvík, 70 ár. Dagurin verður hildin hjá soninum Jógvan, í Hvalsoyargøtu 5, Tórshavn, frá kl. 17.00.

### 80 ára føðingardagur

Leygardagin 16. juli verður Halda Olsen, Hoyvík, fyrrverandi fyristøðukvinna á Ellisheiminum í Havn, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin á Verkhúsinum Virkni, Berjabrekka 2 (yvir av Mylnuni) frá kl. 10–16. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sunnudagin 17. juli verður Leif Djurhuus, Vágur, 80 ár.

Sunnudagin 24. juli fyllur Poul Kjartan Bærentsen 80 ár. Føðingardagurin verður hildin í Lonini í Fuglafirði, har øll eru hjartaliga vælkomin millum kl. 14.00 og 17.00.

### 85 ára føðingardagur

Leygardagin 16. juli verður Lydia Hansen, Norðragøta 85 ár. Føðingardagurin verður hildin í Gøtubrá frá kl. 17.00.

### 90 ára føðingardagur

Sunnudagin 24. juli fyllur Mathilda Weihe av Selatræ 90 ár. Føðingardagurin verður hildin í Sambýlinum Vesturskin á Toftum frá kl. 17.00 til 20.00.

**Prógv**

Tann 24. juni fekk Sjúrður Jacobæus prógv sum jordbrugsteknolog frá Erhvervsakademiet Selandia í Slagelse.

25. juni hevur Oyvindur av Skarði lokið MA-prógv í Stjórnmálafrøði við Háskóla Íslands.

Frank Hansen, Kvívík, hevur 5. juli lokið útbúgving sum Civil verkfrøðingur innan »Byggeri og anlæg« á Ålborg universitet í Ålborg.

## Fotoframsýning í Ribarhúsi

**Rætting.**

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit um eina framsýning við gomlum myndum í Ribarhúsi í Fuglafirði. Vit fingu tað at ljóða, sum at framsýningin longu er latin upp. Men so er ikki. Framsýningin letur upp hósdagin 21. juli kl. 17. Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, fer at siga nøkur orð. Eisini verður sangur og tónleikur at hoyra. Blaðið hevur ábyrgdina av mistakinum.

*Blaðstjórin*